# Tórshavn Open um vikuskiftið

*Vikuskiftið 22. og 23. januar, verður stór badmintonkapping hildi í Badmintonhøllini í Havn*

*Seinasta ár vann Hjørdis Klein kappingina hjá kvinnuunglingum*

***Savnsmynd***

JÁKUP MØRK

Komandi vikuskifti verður stór badmintonkapping í badmintonhøllini í Havn.

Kappingin nevnist Tórshavn Open, og fenir hon um allar aldusbólkar hjá bæði dreingjum og gentum, so ivaleyst verða nógvir dystir, sum skulu avgreiðast um vikuskiftið.

### Byrja leygardagin

Fyri at fáa allar dystirnar fra hondini, verður byrja longu leygarmorgunin kl. 10.30, tá tey smæstu, t.v.s gentur og dreingir yngri enn 10 ár, skulu møta.

Klokkan 13.00 verður sett hol á bólkarnar hjá gentum og dreingjum 10-12 ár, og kl. 15.00 skulu tey 12-14 ára gomlu vera til reiðar at fara á vøllin.

Seinastu kappingarnar leygardagin, eru tær hjá teimum 14-16 ára gomlu, og byrja hesi at spæla kl. 16.30.

Sostatt skuldi verið liðugt at leikt um nátturðatíð, soleiðis at øll kunnu koma heim til hús, áðrenn alt ov langt er liðið úr á kvøldið.

### Tey vaksnu

Sunnudagin skulu unglingar og vaksin royna seg, og verður byrjað kl. 13.00, tá mans- og kvinnuunglingar byrja sínar dystir.

Eftir hetta, t.v.s. klokkan 14.00 er so tíðin komin til, at tey vaksnu skulu á vøllin.

Seinasta ár vunnu Erland Poulsen og Gudrun Jacobsen úr HBF kappingarnar hjá teimum vaksnu, og yvirhøvur hevur tað verið HBF, sum hevur dominerað badmintonkappingarnar seinastu árini.

Tó so, tað eru eisini aðra staðni í landinum, at nógv verður lagt fyri í hesum sambandi, og eitt nú hevur Strálan staðið seg væl á kvinnusíðuni seinastu árini.

Tað er tó serliga í yngru deildunum, at onnur feløg eru farin at gera um seg, og seinasta ár vóru eisini vinnarar úr Vestmanna og Fuglafirði at siggja, tá heiðursmerkini í Tórshavn Open skuldu latast.

### Vinnarar seinasta ár

Finaluluttakararnir á seinastu Tórshavn Open framganga niðanfyri. So fáa vit at siggja, hvussu leikur fer hesu ferð.

**Gentur undir 10 ár:**
Nr. 1 Annika Poulsen, VÍF
Nr. 2 Durita Danielsen, VÍF

**Dreingir undir 10 ár:**
Nr. 1 Reidar Luid, HBF
Nr. 2 John André Niclasen, VÍF

**Gentur 10-12 ár:**
Nr. 1 Jenny Nielsen, VÍF
Nr. 2 Christina Ericsen, VÍF

**Dreingir 10-12 ár:**
Nr. 1 Jákup á Lakjuni, ÍF
Nr. 2 Niclas Eysturoy, HBF

**Gentur 12-14 ár:**
Nr. 1 Ida Jolm Berner, HBF
Nr. 2 Margit Durhuus, VÍF

**Dreingir 12-14 ár:**
Nr. 1 Thomas Hans Rubeksen, HBF
Nr. 2 Karl Jóhann Djurhuus, VÍF

**Gentur 14-16 ár:**
Nr. 1 Elin Hansen, HBF
Nr. 2 Gudrun Poulsen, VÍF

**Dreingir 14-16 ár:**
Nr. 1 Bjartur Lamhauge, HBF
Nr. 2 Hanus Eliasen, ÍF

**Kvinnuunglingar:**
Nr. 1 Hjørdis Klein, HBF
Nr. 2 Annbritt Jensen, HBF

**Mansunglingar:**
Nr. 1 Hergeir Staksberg, HBF
Nr. 2 Andras Jógvansson, HBF

**Meistaradeild, kvinnur:**
Nr. 1 Gudrun Jacobsen, HBF
Nr. 2 Ingun Hansen, Strálan

**Meistaradeild, menn:**
Nr. 1 Erland Poulsen, HBF
Nr. 2 Ragnar Magnussen, HBF

# Máltindurin

## 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Regina Rádó | VB | 99 | (29) |
| Ioana Rápa | VÍF | 96 | (29) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 81 | (33) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 75 | (31) |
| Sunrid Gleðisheygg | Tjaldur | 70 | (14) |
| Inga F. Danberg | Neistin | 64 | (20) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 62 | (3) |
| Arnleyð Krosslá | VB | 56 | 0 |
| Gurið Mortensen | VB | 51 | 0 |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 49 | (2) |
| Ann Hansen | Kyndil | 47 | (9) |
| Simona Hansen | Stjørnan | 45 | (6) |
| Mona Langgard | Tjaldur | 44 | (6) |
| Ileana Manolescu | Neistin | 42 | (13) |
| Nicolina Joensen | VÍF | 42 | 0 |

Við tað at Ioana Rápá hevði frí um vikuskifti, er Regina Rádó nú aftur ovast á máltindinum

## 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sámal Joensen | VÍF | 114 | (22) |
| Artur Johansen | StÍF | 105 | (23) |
| Heini Joensen | Neistin | 102 | (26) |
| Áki Olsen | Neistin | 95 | (12) |
| John Petersen | StÍF | 95 | (26) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 84 | (22) |
| Petur Martin Johansen | KÍF | 79 | (23) |
| Ingi Olsen | VÍF | 77 | (6) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 71 | (1) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 70 | (5) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 65 | (9) |
| Suni F. Johannesen | Tjaldur | 59 | (18) |
| Hannis Wardum | Kyndil | 53 | (7) |
| Martin Hummeland | VÍF | 53 | |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 52 | (6) |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 318 | 247 | 71 | 11 |
| 2 VÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 284 | 261 | 23 | 9 |
| 3 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 267 | 228 | 39 | 7 |
| 4 Neistin | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 226 | 230 | -4 | 7 |
| 5 VB | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 305 | 308 | -3 | 6 |
| 6 Tjaldur | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 221 | 347 | -126 | 0 |

**Stíf hevur tikið liðið úr kappingini**

## Støðan 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 431 | 326 | 105 | 15 |
| 2 StÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 409 | 360 | 49 | 13 |
| 3 Neistin | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 374 | 332 | 42 | 11 |
| 4 Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 397 | 350 | 47 | 9 |
| 5 H71 | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 362 | 417 | -55 | 4 |
| 6 Tjaldur | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 343 | 431 | -88 | 3 |
| 7 KÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 304 | 404 | -100 | 3 |



# Sjúkir og brekaðir suðuroyingar skulu nú tvangsflytast til Havnar

*Sparingin á Suðuroyar Sjúkrahúsi er ein vanlukka fyri suðuroyingar sum ganga til viðgerð fyri sjúkur og brek, sum tey hava at dragast við. Skulu tey yvirhøvur hava viðgerð hereftir, skulu tey tvangsflytast til Havnar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skulu yvir 200 sjúkir og brekaðir Suðuroyingar tvangsflytast til Havnar.

Hetta er ein av avleiðingunum, sum sparingarnar fáa,ið nú eru settar í verk á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Suðuroyar Sjúkrahús fekk ikki nóg mikið av pengum frá landsstýrinum í ár til at virksemið kundi varðveitast á sama støði sum í fjør.

Tessvegna hevur tað verið neyðugt at seta ymsar sparingar í verk og í fyrstu syftu eru fýra fólk søgd upp.

Harðast rakti sparingin í fysioterapiini, harið tvey fólk verða søgd upp.

Og tað fær vanlukkuligar avleiðingar fyri virksemið í fysioterapiini.

John Rødgaard, leiðari á deildini fyri fysioterapi á Suðuroyar Sjúkrahúsi sigur, at nú verða tey noydd at skerja virksemið munandi.

Sparingin merkir, at tilsamans skulu tvey fólk sigast upp í fysioterapiini,

– Hetta merkir, at so at siga øll tann ambulanta viðgerðin má halda uppat, sigur John Rødgaard.

Ambulant viðgerð er at ganga til viðgerð, uttan at vera innlagdur.

Hann sigur, at tað er neyðugt við tveimum fysioterapeutum til at viðgera tey, sum eru innløgd á sjúkrahúsinum.

Men harafturat liggur ellis- og røktarheimið eisini undir sjúkrahúsinum, so búfólkið har skal eisini hava viðgerð hjá fysioterappiini á sjúkrahúsinum.

– So tað er skilligt, at tað verður at kalla ongin tíð til avlops til øll tey, sum ganga til ambulanta viðgerð.

– John Rødgaard sigur, at hetta er ein ómetaliga keðilig stoða, tí hetta rakar eina rúgvu av fólki, sum hava sjúku og brek at dragast við.

Hann sigur, at einasta ambulanta viðgerð, tey kunnu gera sær vónir um at fáa tíð til, er har tað er allarmest neyðugt.



*Tað fær álvarsligar avleiðingar fyri nógvar suðuroyingar, sum hava sjúkur og brek at dragast við, at tað nú verður neyðugt at skerja fysioterapiina á Suðuroyar Sjúkrahúsi*

– Og kanska verður tað harafturat eisini neyðugt at avmarka tænastuna til búfólkið á Ellis- og røktarheiminum, leggur hann afturat.

### 263 fólk í viðgerð

Tilsamans vóru tað 263 suðuroyingar sum gingu í ambulanta viðgerð á Suðuroyar Sjúkahúsi í fjør.

Men higartil hava bíðilistarnir verið langir til at sleppa í ambublanta viðgerð, sigur John Rødgaard.

–Táið fólk so loksins sleppa framat, tekur tað longri tíð at viðgerða tey liðug, enn tað hevði gjørt, um tey sloppu framat beinanvegin.

Hann vísir eisini á, at tey hava nógv børn í viðgerð.

– Talan er m.a. um børn, sum hava tað, tey nevna SI trupulleikar á fakmálið og vanliga tekur tað fleiri mánaðir at viðgerða børnini fyri hesar trupulleikar.

Nú dettur alt tað niðurfyri.

Tey hava eisini eini 15 fólk, sum hava varandi sjúkur og sum ganga til viðgerð av og á, regluliga alt lívið.

Leiðarin sigur, at í fjør hava tey lagt doyðin á at fáa bíðilistan styttan og tað hevur eydnast rættiliga væl.

– Í mai mánaða í fjør stóðu 86 fólk á bíðilista at sleppa í ambulanta viðgerð. men nú er listin komin niður á 15 fólk.

Men nú kunnu tey so gloyma alt um at fáa bíðilistan burtur.

### Ryggskúli fyri skeyti

John Rødgaard sigur, eisini, at tá ið bíðilistin var burtur, høvdu tey ætlað at farið undir ryggskúlar í fysioterapiini.

– Ringur ryggur er nógv tann vanligasta fólkasjúkan og tað kostar samfelagnum nógvar milliónir um árið.

Og á fysioterapiini á Suðuroyar Sjúkrahúsi høvdu tey ætlanir um at fara undir ryggskúla at læra fólk, hvussu tey liva sum frægast við ringum ryggi og, ikki minst, at læra fólk, hvussu tey skulu bera seg at, fyri ikki at fáa ringan rygg og, hvat tey eiga at ansa eftir.

Hann heldur, at samfelagsliga er tað uttan iva ein góð ílaga at gera ryggskúlar at læra fólk at ansa eftiir rygginum.

– Men nú fer eisini ryggskúlin fyri skeytið.

### Tvangsflytast til Havnar

John Rødgaard sigur, at fyri teir 263 suðuroyingarnar, sum ganga til ambulanta viðgerð, fær tað sostatt ómetaliga keðiligar avleiðingar, at fysioterapiini á sjúkrahúsinum verður so nógv skerd.

–Tað eru tveir privatir fysioterapeutar í Suðuroynni, men teir arbeiða bara umleið hálva tí í part.

– Men hjá teimum skulu fólk eisini betala helvtina av viðgerðini sjálvi, so tað verður avgjørt ein fíggjarligur spurningur, antin fólk nú fara hagar ella ikki.

– Og tað er eisini avmarkað, hvussu nógvar sjúklingar tey kunnu viðgerða, tá ið tey bara arbeiða hálva tíð.

– Sostatt verða tað kanska einir 200 suðuroyingar, sum í veruleikanum bara hava tvinnar kostir í at velja:

Antin kunnu tey lata vera við at fáa viðgerð.

Ella noyðast tey til Havnar at fáa viðgerð.

Men tað við so aftur siga, at fólk mugu antin offra ein heilan dag í ferðing fyri hvørja viðgerð, ella tey mugu flyta til Havnar tað tíðarskeiðið, viðgerðin varar.

### Ongin sparing

John Rødgaard sigur, at hann ivast í, hvussu nógv sparing veruliga er í at skerja fysioterapiina táið samanum kemur.

– Talan er um at spara 200.000 krónur í fysioterapiini á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Og fyri at spara hesa upphædd, verða tey allarflestu av teimum, sum skulu hava ambulantaviðgerð, flutt til Havnar- um tey yvirhøvur skulu hava viðgerð og tað kostar eisini pening.

Ella mugu tey viðgerðast hjá fysioterapeutunum, sum arbeiða privat og tað er eisini ein fíggjarligur spurningur.

Og John Rødgaard sigur, at hann hevur leyðsliga roknað út, at skulu øll tey yvir 200 fólkini, sum hava verið viðgjørd ambulant, ístaðin viðgerðast hjá teimum privatu fysioterapeutunum, fer tað í hvussu so er at kosta sjúkrakassanum yvir 300.000 krónur í tilskoti.

Í vissum førum verður kanska eisini talan um hjálp til viðgerðina frá Almannastovni og tað er so ein eykaútreiðsla afturat.

So í veruleikanum er tað í nógvum føum bara talan um at flyta útreiðsluna úr einum almennum kassa, yvir í ein annan almennan kassa.

– Men harafturat koma so teir menniskjansligu avleiðingarnar av at fólk kanska fara at aftra seg við at fara í viðgerð, tá ið tað verður so trupult sum tað nú verður.

John Rødgaard ivast heldur ikki í, at hetta fer at føra til enn fleiri innleggingar á Suðuroyar Sjúkrahús. So alt í alt er lítið vunnið, heldur John Rødgaard.

# Kanska enn fleiri sparingar á Suðuroyar Sjúkrahúsi

*Enn mangla 820.000 krónur í fyri at sleppa undan fleiri uppsagnum á Suðuroyar Sjúkrahúsi*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hóast fýra fólk eru søgd upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi, eru trupulleikarnir langt frá loystir enn.

Tí enn mangla 820.000 krónur í at fáa játtanina hjá sjúkrahúsinum í ár at halda.

Á fíggjarlógini í ár er 1,5 millión ov lítið sett av til at sjúkrahúsið kann varðveita virksemið frá í fjør. Eftir fund ímillum leiðsluna á sjúkrahúsinum og Almanna- og heilsumalaráðið er gjørt av siga fýra fólkum upp. 1,5 ársverk av teimum knapt fýra ársverkunum í fysioterapiini, hvørva og harafturat skal 1/2 fólk sparast burtur í køkini, umframt eitt í leiðbeiningini og eitt á teknisku deild.

Avleiðingarnar á fysioterapiini hava vit greitt frá omanfyri.

Ronnie Midjord, fyristøðumaður hevur ikki stórvegis viðmerkingar til málið

Men aðrastaðni, hava vit fingið at vita, at sparingin á teknisku deild merkir, at ongin teknikari verður á vakt um kvøldið og um næturnar.

### Ikki loystir

Men annars verður víst á, at við hesum eru trupulleikarnar hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi ikki av. Tí enn verður neyðugt at finna sparingar fyri 820.000 krónur fyri at kunna halda játtanina í ár.

Men landsstýrismaðurin ætlar at leggja eyka fíggjarlóg fyri tingið at biðja løgtingið um loyvi til at flyta 600.000 krónur av rakstrinum hjá sjúkrahúsinum til lønir. Sostatt er leiðslan biðin um at bíða við uppsagnum á seingjardeildini og hjá jarðarmøðrunum til tað er avgreitt. Men hóast løgtingið játtar hetta, koma so í øllum førum koma so 220.000 krónur at mangla í til lønir, fyri at sleppa undan at siga fleiri fólkum upp.